# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Umdømið stendur upp á spæl

Stórt arbeiði er lagt í royndirnar at avmarka árinið av Olshana vanlukkuni. Tað tænir myndugleikunum til rós. Men uttan mun til hvussu nógv hugflog, orka og pengar verða nýtt, so slepst ikki undan spurningunum og ivanum, ið eru sett og spurd eftir tað, sum undan vikuskiftinum gekk fyri seg í Tangafirði.

Økið framvið Tangafjørð kennir sviðan, og tjóðin situr við spurninginum, um vit yvirhøvur eru før fyri at takla óhapp og havarí av hesum slagnum. Almenningurin er ivandi, og fyribils tóktist sjóforhoyrið í gjár ikki at gera málið greiðari.

Spurningurin er, hvussu væl tjóðin er trimmað í tilbúgvingarljósinum í Norðurhøvum. Jøkulfellmálið var ein bakslåttur. Eftir politiskt trýst og rumbul varð álitið endurrreist á skipanina við óvildugari kanning, sum greinaði kornið frá dumbuni. Mannagongdirnar vórðu herdar, og neyðugi peningurin játtaður.

Politiski føroyameistarin í fyrispurningum hevur longu sett orð á tað, sum almenningurin nú kennir á sær. Álitið er ikki, sum tað átti at verið, og tað er stak óheppið, tá ið tilverugrundarlagið hjá tilbúgvingini stendur og fellur við álitinum, sum almenningurin – bæði burturi og heima - og brúkararnir seta til myndugleikan.

Í Degi og viku í fyrrakvøldið hevði landsstýrismaðurin hug at leggja seg sjálvan í veð fyri tað, sum er avrikað og kanska ikki avrikað í Tangafirði. Við politisku telvingini í Jøkulfellmálinum í viðførinum kennist tað undarligt, at evsti myndugleikin beinanvegin og ókritiskt heldur seg til kunningina, sum fyriskipararnir í Tangafirði sjálvir hava givið honum.

Føroyingar og serliga tey kring Tangafjørð eru ikki nøgd. Millumtjóða álitið tolir heldur ikki, at frágreiðing og eftirmeting frá ábyrgdarfólkunum stendur einsamøll. Tí eigur landsstýrismaðurin beinanvegin at heita á altjóða stovn – kanska Det Norske Veritas, sum hevur treytaleyst álit allastaðni har maritim áhugamál eru – um at standa fyri óvildugari kanning. Hetta er einasti máti føroyingar kunnu koma sær burtur úr Olshana málinum.

Og tað bara, um ryggurin verður nóg breiður at taka avleiðingarnar av tí, sum slík kanning fer at borðreiða við.

Um kanningin ikki verður gjørd, fara ivin og ampin um tilbúgvingina at vera so mikið stór, at føroyingar og grannarnir í Norðurhøvum fara ikki at hava álitið og kenna trygdina, sum eru alneyðug, tá ið náttúrunnar eirindaleysi meldur leikar harðast á.

Fyri landsstýrismannin og politisku skipanina hevði tað í valturbolensi ikki verið serliga hugaligt, um gongdin í hesum málinum skuldi verið tann, sum hon var í Jøkulfellmálinum. Tí er tiltakið so upplagt, sum beinanvegin skal til fyri at tryggja umdømið.

**Sosialurin**

## Føroyar sum 7 ella 1 valdømi

**Nú tingformaðurin ætlar at leggja uppskot fram á ting um at gera Føroyar til eitt valdømi, hava fleiri tingmenn úr útjaðaranum mótmælt, meðan tað vísur seg at vera størri undirtøka fyri uppskotinum millum miðstaðarpolitikarar**

**THORMUND JOHANNESEN**



Er skipanin við 7 valdømum nú betur fyri útjaðaran enn ein møgulig skipan við einum valdømi?

Trúgvi ikki!

Løgtingslimir eru jú allir valdir lokalt, og mugu tekkjast sínum lokalu veljarum, fyri at verða afturvaldir. Arbeiði fyri onnur valdømi, geva harafturímóti ongar stemmur.

Ein og hvør er sær sjálvum næstur, og politikarin og hansara lokalu veljarar vilja tí fyrst og fremst hugsa um sítt valdømi.

Hettar viðførir, í eini skipan við fleiri valdømum, sum eru ymisk til støddar, at tey størru valdømini hava lættari við at draga til sín. Tey eru betri mannaði, og vegurin til ein meiriluta á tingi er tí styttri enn fyri tey smærru valdømini.

Vit eru tí í eini óndari ringrás, har væl mannaða miðstaðarøki hevur bestu politisku møguleikarnar at draga til sín, meðan illa mannaði útjaðarin onki maktar uttan stuðul frá miðstaðarpolitikarunum. Miðstaðarpolitikararnir hava altso buktina og báðar endarnar.

Treyðugt so, onkrar verkætlanir, sum gagna útjaðaranum, verða viðtiknar á tingi, men tá mugu flestu atkvøðurnar fyri málinum koma frá miðstaðarpolitikarum, sum ikki fáa so mikið sum eina einastu atkvøðu frá útjaðaranum afturfyri. Verandi skipan loyvir tí ikki.

Vóru Føroyar harafturímóti eitt valdømi, vóru politikararnir loystir frá at hugsa lokalt fyri at vera afturvaldir, og kundu arbeitt meira frítt fyri alt landið.

Sjálvandi verða eisini tá flest atkvøður at vinna í miðstaðarøkinum, sum tískil hevur ein politiskan fyrimun, men høvuðsmunurin, og fyrimunurin fyri útjaðaran í mun til nú, verður tó, at allir tinglimirnir kunnu lønast fyri at arbeiða fyri útjaðaran.

Í dag eru til dømis eins 2 løgtingslimir, Gerhard Lognberg og Páll á Reynatúgvu, sum kunnu lønast (les, fáa persónligar atkvøður) fyri at tosa fyri flogvølli í Søltuvík. Og tað er langt frá 2 monnum til meiriluta á tingi.

Vóru Føroyar eitt valdømi, kundi sjálvt Jørgin Niclassen, við persónligum fyrimuni, tosa fyri flogvølli í Søltuvík, tí kanska hann vann fleiri atkvøður aðrastaðni í landinum, enn hann hevði mist í Vágunum.

Undir verandi skipan, er hann tó noyddur at mótarbeiða, tí alt annað vildi verið politiskt sjálvmorð.

Verandi skipan er altso ein bági fyri tann illa mannaða útjaðaran.

Onkur er bangin fyri, at flestu politikararnir, sum frá líður, verða úr miðstaðarøkinum, um Føroyar gerast eitt valdømi. Trúgvi ikki. Men um so verður, hvat ger so tað?

Vága- og Sandoyar valdømi hava í dag bert 2 løgtingslimir í part. Um Føroyar gerast eitt valdømi, far Vágoyggin 32 løgtingslimir, Sandoyggin eisini, ja, vit fáa øll, óansæð hvar vit búgva í landinum, 32 løgtingslimir, sum kunnu arbeiða fyri okkara "lokalu" sjónarmiðum, og ikki minst, vit kunnu løna teimum fyri tað, við okkara atkvøðum.

Sum er verða alt ov fáir politikarar løntir (les, fáa persónligar stemmur) fyri at arbeiða fyri útjaðaran, og hvør vil arbeiða uttan samsýning? Vóru Føroyar harafturímóti eitt valdømi, kundu allir politikararnir fingið nakað politiskt burturúr at arbeitt fyri útjaðaran.

Verða nú allir politikararnir úr miðstaðarøkinum, um Føroyar gerast eitt valdømi?

Hugsa vit okkum, at Norðoyggjar vóru fleiri valdømi, til dømis eitt fyri hvørja kommununa, og tað var talan um, at leggja saman í eitt valdømi fyri allar Norðoyggjar. So høvdu helst røddir verði frammi um, at Klaksvíkin fekk allar løgtingslimirnar, og ikki varð møguleiki hjá til dømis einum kunoyingi ella viðingi, at verða valdur. Men nú vita vit, at tað letur seg væl gera hjá smærru plássunum, at fáa mann valdan, sjálvt um Norðoyggjar eru eitt valdømi, og soleiðis man eisini fara at verða við Føroyum sum einum valdømi.

Ein hjávinningur við at gera Føroyar til eitt valdømi, er at vit fáa fleiri kvinnur á ting, og helst verður tað tað, sum fer at broyta tingarbeiði mest, til fyrimuns fyri tey bleytu virðini og kanska eisini fyri útjaðaran.

Tær fáa kvinnur, ið hava havt á sæti á tingi, hava eisini víst, at tær ikki bert reka við streyminum, men tora at standa í andgletti. Vit minnast Karina Kjølbro frá fyrr av og Anitu á Fríðriksmørk í dag.

Í kjakinum um Føroyar sum eitt valdømi, verður ofta havt á máli, at verandi skipan gevur ikki rættvíst mandatbýti millum flokkarnar í mun til atkvøðutalið.

Ein demokratiskur trupulleiki verður sagt.

Haldi sjálvur, at undirumboðanin av kvinnum á tingi í mun til tær atkvøður kvinnulig valevni fáa, at stórur munur er á atkvøðuvektini alt eftir valdømi, og so tað, at eg ikki havi møguleika at velja tann politikaran mær hóvar best, men einans kann velja millum teir, sum stilla upp í tí valdømi, eg sjálvur eri búsettur í, eru nógv størri demokratiskir trupulleikar.

Kjakið um Føroyar sum eitt valdømi hevur verið alt ov snævurt. Rættvíst mandatbýti og spurningurin um útjaðarin far teir tinglimirnar, hann í dag er tryggjaður, er stórt sæð tey einastu sjónarmiðini, sum verða viðgjørd.

Tað eru so mangir aðrir vinklar, og ikki fyrr enn málið verður lýst nóg fjølbroytt, hava vit nakað veruligt tilfar at taka støðu til.

Nakað annað er so, um tað er rætt at leggja uppskot fram á ting um Føroyar sum eitt valdømi, so stutt upp undir væl, og nú uppstillingar longu eru gjørdar í fleiri valdømum.

Røddir hava eisini verið frammi um at broyta valdømini, kanska færri, heldur enn at gera allar Føroyar til eitt valdømi.

Um so skuldi verið, hevði helst verið rættast, at býtt landið soleiðis upp, at valdømini vóru eins stór, so "togtoganin" millum økini varð á einum javnari støði, tí við verandi skipan vil illa mannaði útjaðarin altíð verða taparin.

Útjaðarapolitikararnir áttu tí at verið heitastu talsmenn fyri broytingum, men teir eru kanska so "lokalir", at teir hugsa meir um egið sæti enn um illa stætta økið, teir umboða.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.